RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD
The Faroese Road Safety Council

18. desember 2023

Fiskivinnu- og Samferðslumálaráðið
Att: Annika Poulsen, fulltrúi
annikap@fisk.fo

**Viðmerkingar til hoyring um broytingar í ferðslulógini**

Hetta vísandi til teldupost tykkara, frá 8. desember 2023, um viðmerkingar til uppskot um broytingar í ferðslulógini. Broytingarnar umfata:

- Stytt heitið á løgtingslógini verður sett inn,
- Nútímansgerð og nágreinan av orðskiljingum,
- Broyting í reglunum um handhildna teleútgerð og øðrum handhildnum samskiftistólum,
- Skeið um rúsdrekka og ferðslu verður víðkað til eisini at fevna um rúsevni,
- Seta bann fyri nýtslu av øðrum lítlum motordrivnum akførum á øki, sum ferðslulógin fevnir um.

Ráðið fyri Ferðslutrygd tekur undir við broytingaruppskotinum í síni heild. Hetta eru alt broytingar sum fylgja hugsjónini hjá RFF og sum stuðla undir tilráðingum, sum kunnu virka fyri betri ferðslutrygd.

Í fyrstu atløgu er tað væl í tráð við rákið í samfelagnum at orðavalið samsvarar gerandisheitið og at orðskiljingar annars verða nútímansgjørdar. Men serliga fegnast vit um broytingarnar um handhildna teleútgerð (eitt evnið, sum er beinleiðis nevnt í Ferðslutrygdarætlanini fyri Føroyar 2019-2027), víðkan av fyriskipanum um skeið fyri tey, ið koyra rúsaði, og nágreining av viðurskiftum viðv. smáum motordrivnum akførum. Hetta eru alt reglur, ið tørvur hevur verið vístur á at fáa greina.

Tikið verður undir við, at hugtakið 'teleútgerð' verður víðkað, so tað fevnir um øll tey ymisku tólini, sum longu finnast, herundir eisini snild-ur. Vónandi og væntandi fevna nýggju broytingarnar eisini um framtíðar tól, sum vit ikki kenna í 2023.

Tikið verður eisini undir við, at bótin fyri handhildna teleútgerð í bilinum verður hækkað og at brotið framyvir eisini skal geva klipp í koyrikortið. Hetta vænta vit fer at fáa fleiri at leggja telefonina, meðan tey koyra bil og tað kann fyribyrgja ferðsluvanlukkum. Hetta er eisini tilmæli nr 54 í Ferðslutrygdarætlanini fyri Føroyar.

Tikið verður undir við at skeið um rúsdrekka og ferðslu verður víðkað til eisini at fevna um rúsevni. Tølini fyri rúsevniskoyring eru tíverri í vøkstri (møguliga eru vit eisini vorðin raskari at máta rúsevniskoyring) og tí skal hetta 'gloppið' í lógini sjálvandi broytast til eisini at fevna um rúsevniskoyring.

RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD
The Faroese Road Safety Council

At enda verður mett gott og neyðugt, at reglan um nýtslu av smáum motordrivnum akførum verður nágreinað, so hon m.a. kann umfata el-rennihjól. Tað var sjón fyri søgn fyri tveimum árum síðani, tá nógv el-rennihjól bráddliga vóru á Havnargøtum, uttan nakra fyrireiking, ella regulering.

Vandamiklar støður vóru nógva staðni, teir fáu dagarnar tey vóru í drift, tí tey:

- koyra skjótari enn man væntar,
- tey eru smá og ring at síggja,
- vit hava ikki vælegnað øki til slík akfør at ferðast á, og
- akførini vístu seg at vera serliga spennandi fyri børn niður í uml. 12 ára aldur, sum bráddliga kundu ferðast nógv skjótari millum bilar og fólk til gongu, men sum ikki hava nóg nógvar royndir ella kunnleika til ferðslureglur, til at kunnu umsita akfarið á tryggan og fullgóðan hátt.

Við omanfyristandandi grundgeving tekur RFF tí undir við at bann verður sett fyri hesum slag av smáum motordrivnum akførum á økjum, har ferðslulógin er galdandi.

Vit notera okkum samstundis, at uppskotið heimilar landsstýrisfólkinum at seta reglur í gildið um onnur smá motordrivin akfør. Skuldi hetta blivið aktuelt í framtíðini, vilja vit eggja til stórt varsemi og til at man leitar sær íblástur úr royndum úr øðrum londum, har hesi akfør eru loyvd, og har man hevur gjørt sær dýrar royndir. Her verður víst til skriv, sum RFF skrivaði til aðalráðið í apríl 2022, tá evnið var á breddanum og verður tað eisini sent við hesum hoyringssvari.

Blíðar heilsanir
**Ráðið fyri Ferðslutrygd**

Lovisa Petersen Glerfoss, stjóri